tíðindablaðið
sosialurin

55. árg. ★ kr. 4,-
Nr. 36 ★ Leygardagur 1. mai 1982

frælsi javnaður brøðralag

Føroysk húsmóðir í Libya

Lesið samrøðu við Beintu Zidan

á síðu 9

Teir royna nýggjar leiðir:



Páll Olsen (til vinstru) frá Fiskirannsóknarstovuni og tveir av manningini á Hoyvíkingi, sum fór út at royna eftir høgguslokki hósdagin. Fremst á myndini tann serliga útgerðin at veiða høgguslokk við: datastýrd snella, sliska og rulla

Lesið á síðu 2

Lagnan hjá Kaldbaksfirði skuldi avgerast á býráðsfundi:

Eg verði bangin

Kaldbaksfjørður kann rúma fleiri túsund tonsum av alifiski — nú vilja býráðslimir í Havn nýta fjørðin til ídnað

— Eg beri ótta fyri menningini í hesum landi, um politikarar seta so óbúgvin og so lítið eftirkannað uppskot fram, sum tað varð gjørt á seinasta býráðsfundi.

Hetta sigur Guttormur Djurhuus, fiskaalari í samrøðu við Tíðindablaðið Sosialin. Guttormur Djurhuus var sjálvur hjástaddur, tá Tórshavnar býráð seint hóskvøldið viðgjørdi eitt uppskot frá Arnstein Niclasen, Ronald Poulsen og Dánjal Larsen um, at Tórshavnar kommuna beinanvegin skal ognartaka eitt stórt lendi á Sundi, og láta vinnulívsmenn sleppa at byggja fiskiidnaðarvirki har.

Uppskotið hjá teimum trimum varð ikki samtykt. Harafturímoti varð eitt annað uppskot um at gera eina byggisamtykt fyri økið fyrst og harumframt at ognartaka eitt lendi á Sundi samtykt.

Vit hava biðið Guttorm um eina viðmerking til viðgerðina av hesum máli — at frá einum umhvervis- og fiskaalisjónarmiði. Guttorm sigur, at fá plass í Føroyum eru vælegnað til áling. Kaldbaksfjørður er helst eitt, ella tvey, sum egnar seg. Har er mugulekt at ala fleiri túsund tonn av fiski í framtíðini, men verða fiskaidnaðarvirki lagd á Sundi, fer hetta at taka grundarlagið undan áling har á fjørðinum.

Guttormur sigur viðari:

— Eg má siga, at eg bæði rodnaði og skammaðist, tá eg hoyrdi, hvussu lítlan kunnleika onkur av okkara sokallaðu verkfrøðingum vísti seg at hava til umhvørvisspurningar. At draga Eyturs jógvin fram sum recipient dømi, sum hevur klárað seg væl, ber prógv um, at maðurin er kemiskt reinur fyri kunnleika á økinum. Sum kunnugt berjast (og hava barst leingi) øll eyturs jóarlondini fyri at bjarga Eyturs jónum undan týning.

Ein glotti tykist nú at hómast, men hevur tað kostað ómetaliga nógv í ileggingum í reinsi anlegg. Eisini hevur man roynt at avmarka virksemi kring hetta innfav, men sum dømi um, hvussu ílla fiskurin hat er eitraður kann nevnast, at bann er fyri at eta livur úr Eyturs jónum.

Tað mest tapaða, um sagt varð hálvt og tá var tað at fiskaáling dálkar og tað í ólukkumáta er at tað [illegible] orsøk var tilsi [illegible]

Framhald á síðu 5

Tey finna fram til nýggjar rættir

Dennis Smith, Gloria Guðjónsson og Dánjal Gaardlykke inni í køkinum á Fiskasafnini

Lesið á síðu 4 og 5